## UTTAN ÚR HEIMI

### Sleppa nú heimaftur

Sunnudagin samdust stjórnin og uppreistrarmenninir har suðuri í Sudan um at gera enda á tí 21 ára langa borgarakrígnum.

Lisa Henry, sum arbeiðir hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar í Sudan, sigur, at friðarsáttmálin gevur teimum nógvu suðursudansku flóttafólkunum møguleikan at venda heimaftur. Teir seinastu seks mánaðarnar eru nógv flóttafólk komin heimaftur, tí tað hevur verið toliliga friðarligt, og Lisa Henry væntar, at semjan fer at fáa uppaftur fleiri at venda aftur til heimbygdirnar.

ST heldur, at borgarakríggið hevur rikið umleið tvær milliónir suðursudanar frá húsi og heimi.

### Skuldin skal strikast

Vesturheimurin eigur at strika skuldina hjá teimum flóðalduraktu londunum í Suðurasia, so tey kunnu koma aftur á rættkjøl búskaparliga. Tað heldur í hvussu er forsætisráðharrin í Luksenburg, Jean-Claude Juncker.

Mikudagin fara londini í tí sokallaða París-felagsskapinum at tosa um tað, sum tey eiga til góðar hjá londunum í Suðurasia. Í felagsskapinum eru 16 lond í Vesturheiminum umframt Russland, Japan og Avstralia, men tað er litið, sum bendir á, at londini hava hug at fylgja tilmælinum hjá Jean-Claude Juncker. Eygleiðarar vænta, at londini heldur fara at útseta avdrøgini, sum londini í Suðurasia eiga at gjalda.

Franski forsetin, Jacqurs Chirac, hevur kortini sagt, at eftir hansara tykki er tað ikki nóg mikið at útseta avdrøg ella at frysta skuldina. Sambært Chirac mugu tey bæði fátækastu londini í økinum, Indonesia og Sri Lanka, fáa serliga lagaligar treytir frá lánsveitarunum.

### Umhugsa drápslið

Amerikanska tíðarritið Newsweek vil vera við, at verjumálaráðið í Washington umhugsar at skipa nøkur drápslið í Irak. Uppgáva teirra verður at beina fyri teimum, sum skipa fyri ófriðinum har. Blaðið vísir á, at USA hevur roynt hesa framferðina fyrr. Tað var í áttatiárunum, tá Reagan-stjórnin mannaði fleiri drápslið, sum gjørdu av við vinstrasinnaðar uppreistrarleiðarar í Miðamerika.

Ein ónevnd hernaðarkelda sigur við Newsweek, at leiðslan í Pentagon er komin til ta niðurstøðu, at tað er neyðugt at gera eitt ella annað fyri at fáa enda á ófriðinum í Irak. Sambært kelduni viðger verjumálaráðið í løtuni eitt uppskot um at lata kurdar og shiamuslimar manna tey iraksku drápsliðini.

Sambært kelduni er tað ikki óhugsandi, at drápsliðini fara eftir uppreistrarmonnum, sum halda til í grannalondunum hjá Irak. Sýrialand verður nevnt í hesum sambandi, sjálvt um stjórnin í Damaskus fleiri ferðir hevur avsannað, at landið hýsir irakskum uppreistrarmonnum.

### Krógvaði pengar

Í Kili hevur ein kanningardómari avdúkað, at fyrrverandi einaræðisharrin Augusto Pinochet flutti nógvar pengar av landinum og krógvaði teir í útlendskum bankum.

Eftir drúgvar kanningar er Sergio Munoz, dómari, komin eftir, at Pinochet setti fleiri milliónir krónur á eina loyniliga kontu í Riggs Bank í Washington, og hann er eisini komin fram á loyniligar kontur í bankum í New York, Miami og London. Sambært dómaranum komu pengarnir frá kilska hervaldinum, og tilsamans er talan um einar 100 milliónir krónur.

Sergio Munoz vil eisini vera við, at Pinochet brúkti almennar pengar til at keypa sær ynmsar fornlutir, prýðislutir og innbúgv. Tað var kortini ikki hann, sum keypti vørurnar, tí hann lat altíð umboðsmenn hjá hervaldinum keypa tær fyri seg, tá teir vóru á ferð í útlondum, sigur Sergio Munoz, dómari.



*Nývaldi palestinski forsetin Mahmoud Abbas*

*Mynd: Reuters*

# Mahmoud Abbas vann

**Sum væntað vann Mahmoud Abbas palestinska forsetavalið sunnudagin, men hann fær eina torføra uppgávu**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Longu áðrenn valhølini lótu aftur sunnukvøldið, var greitt, at Mahmoud Abbas skuldi taka við sum palestinskur forseti eftir Yasser Arafat. Spurnarkanningar uttan fyri valhølini vístu, at hann hevði fingið umleið 70 prosent av atkvøðunum, og at tað var meiri enn tríggjar ferðir meiri enn hansara fremsti avbjóðari, Mustafa Barghouti, hevði fingið.

Eygleiðarar í Miðeystri eru á einum máli um, at palestinska forsetaembætið verður ikki nakar dansur á rósum, serliga tí at bæði palestinar og umheimurin krevja nógv av tí nývalda forsetanum.

Í fyrsta lagi skal hann fáa skil á palestinska búskapinum, sum liggur í skeljasori, og ein onnur týðandi uppgáva verður at fáa ræðið á trygdardeildunum. Hann skal eisini standa fyri samráðingunum við Ísrael um ísraelsku afturtøkuna úr Gaza-geiranum, og hann skal fáa teir víðgongdu palestinsku bólkarnar at leggja vápnini.

Sunnukvøldið royndu fleiri palestinskir talsmenn at ávara tey, sum seta nývalda forsetanum stór krøv.

– Eg havi varhugan av, at nógvir palestinar eru ov bjartskygdir í hesum døgum, segði samráðingarleiðarin hjá palestinsku myndugleikunum, Nabil Shaath, við sjónvarpið CNN. Ein av teimum fremstu palestinsku viðmerkjarunum, Ghassan Khatib, vænat heldur ikki tær storu broytingarnar í bræði.

- Tað avgerandi er, um ísraelska stjórnin vil broyta sína framferð, segði hann sunnukvøldið.

Ísrael hevur gjørt greitt, at hon fer at seta nývalda palestinska forsetanum krøv, og tað fyrsta er, at hann skal seta teir víðgongdu bólkarnar upp á pláss. Ariel Sharon, forsætisráðharri, hevur gjørt greitt, at tað verða ongar samráðingar um frið, fyrr enn teir víðgongdu bólkarnir gevast við harðskapinum.

# Funnin eftir 14 dagar á havinum

**Tann 22 ára gamli indonesin Ari Afrizal skolaði út við flóðalduni annan jóladag. Nú er hann funnin aftur**

FLÓÐALDAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ari Afrizal búði í indonesiska landspartinum Aceh, og hann var ein av teimum mongu, sum skolaðu út, tá tann stóra flóðaldan legði fleiri bygdir og býir í landspartinum undir í sjógvi.

Fríggjadagin varð hann funnin aftur, tá eitt farmaskip úr Sameindu Arabisku Emiratunum kom fram á hann, skrivar Reuters. Einki verður sagt um, hvussu hann hevði hildið sær flótandi so leingi.

Ari Afrizal er tann triði, sum er funnin á havinum síðani flóðalduna. Tann 30. desember fann eitt skip eina indonesiska kvinnu, sum hevði rikið á havinum síðani annan jóladag, og nakrar dagar seinni fann eitt japanskt skip ein mann, sum hevði sitið á einum træi í Indiska Havinum í átta samdøgur. Hann varð settur í land í Malaysia, og myndugleikarnir har hava nú boðið honum at varandi uppihalds- og arbeiðsloyvi.

Í gjár kom ræðsla á fólk í Aceh-landspartinum av einum hørðum eftirskjálvta undir havbotninum vestan fyri Sumatra. Skjálvtin, sum var 6,2 á Richter-stiganum, var so mikið harður, at hús í býnum Bandar Aceh skulvu, og fólk runnu ræðslusligin í gøtunum, skrivar Reuter.